


*Nr. 13* *20. juni 2021* *81. árg.*

# Kristindómur – eitt hjartamál

Ein trúboði í Afrika prædikaði um Jesu líðing og deyða fyri syndir okkara, tá ið ein gamal maður, sum hevði lýtt á við miklum áhuga, reistist og rópaði skelvandi á málinum: „Er tað satt?“

„Ja, tað er satt,“ svaraði trúboðin.

„Er tað veruliga hent?“ spurdi hin gamli spentur.

„Hetta er hin fullkomni sannleikin,“ svaraði trúboðin.

Tá runnu tárini niður eftir kinnum hansara, í tí hann spurdi skelvandi á málinum: „Torir tú at svørja uppá, at tú talar satt?“

„Ja, eg svørji upp á tað fyri Guds andliti,“ svaraði trúboðin.

„Á, tit kristnu!“ rópaði hin gamli, hava tit tá einki hjarta, av tí at tit kunnu tala soleiðis um kærleika!“

Hvussu lættliga lýsir ikki henda ákæra okkum. Kristindómur er ikki eitt vitskumál, men eitt hjartamál.

Tann dagin, vit er hildin uppat at undrast á Guds kærleika til okkara í Jesusi Kristi, er afturgongd í kristnilívi okkara. Boðskapurin um hann, sum doyði í syndarans stað, hitt sterka orðið, skal ongantíð gerast ov gamalt, okkurt sjálvsagt og alvanligt hjá okkum. Tí mugu vit støðugt biðja: „Harri, endurnýggja anda tín og kærleika tín til okkara, so at vit við einum undrandi og eyðmjúkum sinni megna at elska og tilbiðja teg.“

*Tá bjargaði mær megi tín,*
*ei deyðan óttist meir,*
*so fróur frelsti andi mín*
*skeyt hamin – mold og leir.*

*t. hansen* ums.

# Sálmur 23, vers 5

Eg má viðganga, at eg altíð havi undrast á, hvat ið hetta pettið í Sálmi 23 merkti. Eg hugsaði „Tú salvar høvd mítt við olju“ (v. 5 V.D.), var myndatala og skuldi boða frá, at Gud varðveitti sálmaskaldið, so hann var sunnur og frískur. Eg visti ikki, at tað eisini hevði ein djypri týdning.

## Salvar høvd mítt við olju

Seyður kann fáa høvdið vavt inn í viltvaksandi rósurunnar, og hann kann doyggja, tá ið hann roynir at sleppa leysur. Tað eru eisini andstyggiligar lítlar flugur, sum dáma at pína og plága seyðin við at verpa víggj (t.e. fluguegg) í nasagluggarnar á honum. Víggini verða til maðkar, og teir tvinga seyðin at berja høvur sítt móti einum kletti. Viðhvørt slær seyðurin seg til deyðis. Oyruni og eyguni verða eisini ávirkað av hesum flogkyktum, sum pína og plága. Hirðin salvar tí alt høvdið á teimum við olju. So er friður. Henda oljan verjir móti tí ondskapi, sum roynir at oyðileggjað seyðin.

Eru tað tíðir í tínum lívi, har tú plágast av sálarligari pínu? Ørkymlandi tankar herja á teg aftur og aftur? Slært tú høvdið móti einum veggi fyri at royna at steðga teimum? Hevur tú nakrantíð biðið Gud salva teg við olju? Hann hevur óendaligar nøgdir! Hansara olja verjir og ger tað møguligt hjá tær at festa títt hjarta, tín hug og tíni eygu á Hann (Hirðan, Frelsaran) í dag og altíð! Tað er friður í dalinum! Má okkara góði, góði Faðir salva høvur títt við olju í dag, so at bikar títt flýtur yvir við signingum. Gud er góður, og Hann er trúfastur.

Úr enskum. *Effie Campbell* umsetti.

# Tað, sum tarnar bøn

Ymiskt er, hvussu bønalívið er hjá okkum øllum. Her skulu tit hoyra, hvussu ein maður sigur frá sínum bønalívi:

Tríggir eru lutirnir, sum tarna bønalívinum. Sjálvandi, um tú heldur bøn um morgunin, mutlar nøkur fá orð í bøn, og tú so skundar tær til arbeiðis, so veitst tú ikki, hvat eg meini. Eg tali um veruliga bøn, sum fær bønasvar.

Tú hevur helst upplivað, at telefonin ringdi, ella pinkubarnið græt, ella ein vinur kom at vitja, meðan tú baðst. Illimaður dugir væl at órógva teg. Eg havi rakt við, at mær tørvar tíð og stað, tá ið eg biði, og staður mín er lestrarstovan. Fyrsti tími eftir morgunmatin er mín bønatíð.

Tá ið eg eri á ferð ella eri ikki heima við hús, royni eg at finna mær ein friðarstað, har eg kann biðja. Onnur vita, hvussu long bønatíð mín er, so órógvar eingin meg. Eisini tær nýtist tíð og stað, har tú kanst tala við Gud. Bara á henda hátt sleppur tú undan órógvi. Hesin staðurin verður so dýrmætur fyri tær, at tú kennir á tær, at tú ert á heilagari grund.

Veitst tú um at vera tungur ella svøvntungur, tá ið tú heldur bøn? Kanska tú liggur á knæ, leggur høvdið niður á armarnar, blundar og roynir at biðja. Brátt gerst tú svøvntungur og kanska sovnar.

Tá ið eg biði einsamallur, leggi eg meg ikki á knæ – eg gangi. Fyrst seti eg innbúgvið fram við veggjunum, og so gangi eg aftur og fram, meðan eg tali við Gud. Meðan árini hava liðið, havi eg gingið aftur og fram fleiri hundrað fjórðingar í bønastundum mínum. Eg haldi, at ganga er hin besta likamliga venjingin, so eg gangi og biði og fái ta likamsvenjing, sum mær tørvar.

Tá ið tú roynir at hugsavna teg í bøn, varnast tú ofta, at tú hugsar og leggur ætlanir og stúrir fyri onkrum øðrum. Sinni títt fer lættliga til viks burtur frá hesi krevjandi uppgávu. So eg biði altíð hart. Meðan eg gangi aftur og fram, verða bønaevni míni latin í orð, og at vera orðunum lýðin, sleppi eg undan flakkandi sinni. Eg hugsavni meg um, hvat eg sigi, tá ið eg biði, líka væl, sum tá ið eg prædiki.

Tá ið eg felli á knæ og biði stillisliga, líður tíð tín ikki skjótt. Men tá ið eg gangi og biði hart, varnist eg, at tíðin líður ógvuliga skjótt.

Vit hava nú viðgjørt tríggjar lutir, sum tú upplivir í bønalívinum. Hevur tú vunnið á teimum og ert vorðin ein bønakappi fyri Gudi? Hevur tú ikki, so er møguleiki at vinna henda sigur. Royn hesi hugskotini! „Harri, lær okkum at biðja“ (Luk 11,1).

*t. hansen* ums.

# Tað er rætt

*Anne Christiansen*

Tað er rætt at søkja Guds ríki fyrst. Tað er rætt at taka til sín av Guds orði hvønn einasta dag. Tað er rætt at søkja Gud í bøn til allar tíðir. Tað er rætt at halda fast í felagsskapinum við øll tey trúgvandi og ikki halda seg burtur, tá ið meinigheitin savnast. Tað er rætt at geva tíggjund og heilagar gávur inn í Guds ríki av tí, sum vit eiga at umsita. Tað er rætt at fara til altars og minnast tað mest týðandi í trúgv okkara. Tað er rætt at liva í fyrigevingini og at fyrigeva øðrum, líka sum vit sjálv hava fingið fyrigeving. Tað er rætt at geva evangeliið um Jesus víðari til øll menniskju í okkara verð, og tað er rætt at senda onnur út, sum leggja doyðin á at gera tað.

Tað eru mong ymisk ting, sum eru týdningarmikil at halda fast í, uttan mun til tíðirnar vit liva í. Á tann hátt verður trúgvin førd frá einum ættarliði til annað og vil halda á at gera tað, sjálvt um tíðirnar skifta og broytingar fara fram, sum kunna upplivast krevjandi og avbjóðandi. Móses helt á, eins og sá hann hin ósjónliga (Hebr. 11,27). Vit verða eggjað at hava okkara eygu fest á Jesus, trúarinnar upphavsmann og fullkomnara (Hebr. 12,2), og gjøgnum alt hetta kann trúgvin ikki tærast og hvørva, men hon verður góðskað og endurnýggjað, styrkt og uppbygd.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Tað hendir so nógv ónt og ræðuligt í verðini og eisini her heima hjá okkum. Men skrivað stendur í Orðt. 11,11, at **signingarnar hjá teimum rættvísu fáa býin at blóma.** So latið okkum vera trúføst í forbønini fyri okkara landi og okkara býum og bygdum, so Gud verjir okkum. Latið okkum biðja: „Leið okkum ikki í freistingar - men frels okkum frá tí illa!“

*e.c.* ums.

---

Eingi mørk eru fyri, hvat ið ein persónur kann røkka, so leingi sum hann ikki er heftur av, hvør ið skal hava æruna.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 20. juni | Tekstur: Áps. 8,26-40 | bíbliuorð: 1 Tim. 2,4 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




*Nr. 14* *4. juli 2021* *81. árg.*

# Hvaðani kemur hitt góða frá?

*Sten Sørensen*

Ofta verður kjakast um, hvaðani tað ónda kemur frá. Hvussu kann ein góður, almáttugur og alvitandi Gud verða til, samstundis sum nógvur óndskapur er í verðini? Ja, nógv ónt er í verðini, og tankar okkara leita til teirra, sum uppliva óndskapin í sínum gerandisdegi. At Djevulin og myrkursins kreftir eru til, síggja vit sanniliga í verðini í dag.

Men tað er ikki um tað ónda, eg skal skriva um í dag. Tvørturímóti. Mín spurningur er: Hvaðani kemur hitt góða frá?

Hvaðani kemur hitt góða vinalagið frá? Hvaðani kemur kærleikin frá? Hvat ger, at eg blívi so góður við abbabørnini? Hvaðani kemur miskunnsemið frá? Hvat er tað, sum ger, at eg blívi so glaður, tá ið eg gangi úti í skapanarverkinum? Ja, hvaðani kemur gleðin frá?

Hin kendi kirkjuleiðarin og ein av størstu teologunum í fornøldini, Augustin, hevur sagt: „Um Gud ikki er til, hvaðani kemur hitt góða frá?“

Tá ið Gud hugdi út yvir skapanarverkið: havið, skógina, blómurnar, dýrini, fiskarnar og menniskjuni, stendur skrivað: „Og Gud leit at øllum, sum hann hevði gjørt, og sí, tað var sera gott.“ 1. Mós. 1,31. Gud var ógvuliga nøgdur, og Hann helt tað vera ómetaliga vakurt.

Hvaðani kemur hitt góða frá? „Hvør ein góð gáva og hvør ein fullkomin gáva er omanífrá og kemur niður frá faðir ljósanna, og hjá honum er ikki umbroyting ella umskiftingarskuggi.“ Ják. 1,17.

Tað, sum letur upp dyrnar fyri evangeliinum, er góðska. Tað er vegna Guds góðsku, at vit eru frelst. „Ella vanvirðir tú ríkidømið av góðsku hansara og tolmóð og langmóði, og veitst ikki, at Guds góðska leiðir teg til umvendingar?“ Róm. 2,4. Evangeliið verður jú kallað tey góðu tíðindini.

*Effie Campbell* umsetti.

# Guds orð sum medesin

*„Statt upp og skín, tí at ljós títt kemur og*
*dýrd Harrans rennur upp yvir tær!*
*Tí sí, myrkur hylur jørðina og sorti fólkini;*
*men yvir tær rennur Harrin upp, og dýrd*
*hans birtist yvir tær.“ Jes. 60,1-2.*

Astrid Nestvold var gestur á Kanal 10 í sendingini „Bønn i natten“, har segði hon nakað soleiðis:

Vit skulu vera í Jesusi. Hann lýsir gjøgnum okkum. Hvussu vera vit í Jesusi? Jesus er orðið. (Jóh. 1,1) Vit vera í Jesusi við at fylla okkum við orðinum. Tá eru vit í Kristusi og hann í okkum. Vit mugu taka ímóti orðinum. Tú kanst ikki hava størri trúgv enn hana, sum tú handlar uppá og gert eftir. Les orðið hart, tá bæði sært tú tað og hoyrir tað.

Viðhvørt hoyra vit fólk siga: „Eg elski Jesus!“ – Elska vit Jesus? Ja, um vit elska orðið, tí Jesus er orðið. Jósva 1,8 sigur: „Hav altíð hesa lógbók (orðið) á munni og grunda yvir hana dagar og nætur.“ Og í Orðtøkunum 4,20 stendur: „Sonur mín, gev orðum mínum gætur, vend oyra tínum til talu mína.“ Hvussu venda vit oyra til? Jú, vit mugu boyggja høvur, tá ið vit sita og lesa í Bíbliuni, og tað merkir at vera eyðmjúkur móti orðinum, sum er Jesus.

5. Mós. 11,24 sigur: „Hvør staður, sum tit stíga fótin á, skal verða ogn tykkara.“ Gud svarar aftur upp á orð sítt, tí skulu vit biðja út orðið. Vit meina so nógv, men Gud hevur ikki biðið okkum um at meina, men at akta orðið og vera orðinum lýðin.

Í Orðtøkunum 4,20-22 stendur: „Sonur mín, gev orðum mínum gætur, vend oyra tínum til talu mína. Lat tey ikki víkja frá eygum tínum, varðveit tey innast í hjarta tínum. Tí tey eru lív fyri teimum, ið finna tey, og heilsubót fyri alt teirra likam.“

Eg brúki Guds orð sum heilivág. Hvussu tá, kanst tú spyrja? Jú, eg tali Guds lyftir yvir mítt likam. David Yonggi Cho sigur

frá einum nevrologi, sum ikki var kristin. Hesin nevrologur sigur, at hvør kykna í kroppinum hoyrir tað, sum tú sigur. Tala Guds orð yvir tín kropp. Eg biði ofta út frá lyftunum í Sálmunum, t.d. úr Sálmi 91:

„Takk Harri, at tú vilt bjarga mær frá drepandi sótt (v. 3). Takk, at tú sigur, at eg ikki skal ræðast ræðslur á nátt (v. 5), ella sjúku, ið herjar um middagsleiti (v. 6)". Og soleiðis haldi eg fram. Harrin er trúfastur móti orði sínum, og hann svarar aftur upp á orðið. Í Sálmi 138,2 stendur: „Dýrt hevur tú Orð títt gjørt yvir alt títt navn." Hugsa tær, Gud setir orð sítt hægri enn navn sítt, so mugu vit, børn hansara, eisini meta tað høgt.

*Effie Campbell.*

# Tá ið tú eingi orð eigur

Eg hitti ofta óttafull kristin, sum halda, at tey ikki finna tey røttu orðini, tá ið tey skulu biðja. Tað er mín bøn, at hesi fáu orð niðanfyri kunnu vera ein uggi.

Fyri tað fyrsta: Gev tær far um Jesu orð í Matt. 6,7: „Tá ið tit halda bøn, tá skulu tit ikki taka upp í saman nøgd av orðum eins og heidningarnir, tí at teir halda, at teir munnu verða bønhoyrdir fyri orðanøgd sína."

Tað stendur ikki, at vit ikki mugu brúka mong orð; men har stendur, at tað er ikki talið ella mongdin av orðum, sum ger, at tú verður bønhoyrdur. „At lata munnin flóta yvir við orðum" sammeti eg við HEILA-virksemi. Men okkara bøn eigur ikki at hava sín uppruna í heilanum – men í HJARTANUM.

Tað er betri at hava eitt BIÐJANDI HJARTA uttan orð – enn eina mongd av HEILA-ORÐUM uttan eitt biðjandi hjarta.

Jesus sigur í Jóh. 4,24: „Gud er andi, og teir, sum tilbiðja hann, eiga at tilbiðja í anda og sannleika." Hetta geldur eisini bøn. Ver kvirrur og gev tær far um, bíða eftir, hvat ið tú kennir á tær í tínum sinni – í tínum anda – og bið ella suffa ella syng tað so.

Rómverjabrævið 8,22-27 lýsir ein longsul eftir Gudi, sum er nógv meira enn orð – og eina leiðbeining, sum er meint sum ein hjálp: „Tí at vit vita ikki, hvat ið vit skulu biðja um." (v. 26) Skrivað stendur, at vit enntá suffa við ÓSIGANDI SUFFUM. Tað eru ikki bara orðini, sum eru ósigandi, men eisini suffini.

Men í teimum ósiggandi suffunum er HEILAGI ANDIN, sum leggur uppí og biður – eftir Guds vilja.

Í Mark. 7,34 var Jesu bøn eitt suff móti Himli! Í Mark. 8,12 suffar Jesus tungliga í anda sínum!

Í 2. Mós. 2,23 hoyra vit ísraelsmenn suffa undir trælaoki. Suffini blivu hoyrd og svarað soleiðis: „Gud sá til ísraelsmenn, og Gud kendist við teir.“ Tað vil siga, hann tók sær av teimum.

Tá ið tú kennir teg tóma fyri orð, so ugga teg við Sálm 102,18: „Gud vendir sær at bøn teirra ørmu og vrakar ei teirra bøn.“ Hav gott treysti, tú suffandi Guds barn! Tín Frelsari og Harri suffaði eisini.

Bøn uttan orð! Ver ikki ørkymlaður, tá tað hendir teg. Eisini Jesus hevði tíðir, tá ið hann suffaði tungliga í anda sínum – uttan orð. Ikki um, men tá ið tú kemur í eina slíka støðu, har tú ikki veitst, hvat ið tú skalt biðja um, so minst til, at tað samsvarar heilt við tað, sum Gud sigur í orði sínum. (Róm. 8,22-27). Tískil er tað ikki ein ósigur, men vanligt.

*Effie Campbell* umsetti.

# Blindleiki eingin forðan

Ein blind kona bað onkran hjálpa sær at strika undir Jóh. 3,16 í Bíbliuni hjá sær. So setti hon seg við Bíbliuni við inndyrnar til lærda háskúlan. Her komu nógv fólk framvið. Síðani segði hon við nøkur tilvildarlig fólk, sum komu har: „Kundi tú lisið hetta fyri mær?“ Orðini virkaðu sterkt inn á tey, og mong blivu frelst gjøgnum hana. Ein broyting hendi við teimum.

*Da Jesus kom inn, da Jesus kom inn,*
*alt blev forandret, da Jesus kom inn.*
*Jeg kan det ei forklare, hva som skjedde i mit sinn,*
*men å for en forskjell, da Jesus kom inn.*

*Effie Campbell.*

---

Gleðin er at vera, tann tú ert, har tú ert. *e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74